## VIÐMERKINGAR

# Ikki hissini fordómar

**Harry á Lakjuni**

Eftir at hava lisið greinina, "Kristna fundamentalisman oyðileggur okkum", sum var samrøða við Johannes Møllehave, 23. nov. í Sosialinum, mátti eg spyrja meg sjálvan, um maðurin yvirhøvur veit nakað sum helst um føroyskt kirkju-, samkomu- og trúarlív.

Sjálvur havi eg gingið á møti, síðan eg var lítil smádrongur, og havi hoyrt nógvar túsund talur, prædikur av bæði monnum og kvinnum, eisini úr ymiskum trúarsamfeløgum. Men ongantíð havi eg hoyrt ein boðskap, sum ber brá av, at vit skulu hata ávís menniskju.

Í greinini sigur Møllehave m.a.: "Veruleikin er jú, at ringastu fundamentalistarnir ofta eru teir kristnu, sum ganga frítt ímillum okkum og standa enntá á okkara prædikustólum og fordøma og oysa hatur og hevndarhuga út yvir samkomuna".

Nú er tað blivið modernað at kalla tey kristnu fyri fundamentalistar, og tað hoyra vit oftari og oftari — og tað í einum negativum týdningi — men lat tað fara!

Hetta er ein ótrúlig ákæra, sum presturin kemur við, og tað er so oyðasørt, at journalisturin, Anna V. Ellingsgaard, konfronterar mannin við tað, hann sigur, og spyr, hvar hann hevur hoyrt henda haturs- og hevndarboðskap. Tey, sum lesa samrøðuna við Møllehave, ganga sjálvandi út frá, at hann hevur hoyrt slíkt í Føroyum, tí annars var eingin grund til at sláa tað stórt upp í føroyskum blað. Mangur kirkju- og/ella møtigangari man ógvast við eitt slíkt úttalilsi frá hesum danska presti.

"Tað undrar ikki Møllehave", sigur Anna Ellingsgaard, "at vit her heima javnan síggja lesarabrøv í bløðunum, har fólk verða hongd út sum ógudilig og heidningar, tí tey hava víst á tann humanistiska boðskapin í Bíbliuni, sum tosar um fyrigeving og tolsemi heldur enn fordøming og revsing".

Nú veit eg ikki, hvussu nógv Møllehave lesur føroysk lesarabrøv, men her skyldar Anna Ellingsgaard at siga okkum, hvørji hesi lesarabrøv eru, sum javnan heingja fólk út sum ógudilig og heidningar. Men tað mest ørkymlandi við hesum brotinum er, at tað verður tosað um "tann humanistiska boðskapin í Bíbliuni".

Tíbetur eigur humanisman, sum útilokar Gud og setur menniskjað í sentrum, ongan lut í boðskapi Bíbliunnar. Bíblian er sambært sær sjálvari guddómlig, innblást av Gudi (2.Tim.3.16). Víst er kærleiksboðið stórt, men boðskapurin um náði, fyrigeving og frelsu skúgvar ikki aðrar meginreglur Bíbliunnar til viks, so sum humanisman ger tað.

"Vit sita øll í sama toki og eru á veg til sama stað", sigur Møllehave. Um her verður sipað til, at vit øll stundað ímóti gravarbakkanum, so er tað rætt. Ella um tað verður sipað til, at vit øll av náttúru eru í sama toki, so sum Róm. 3, 10-20 vísir á, so er tað eisini rætt. Men tað er ikki rætt, at vit pr. automatikk eru í sama toki, sum førir til himmals, um tað er tað, presturin meinar. Men til alla lukku fyri okkum, ið vóru so illa stødd, sum Róm. 3 talar um, kom tilboðið um náði, frelsu og fyrigeving — ikki ein humanistiskur boðskapur — men ein boðskapur um eina fullkomna frelsuætlan úr erva, sum ikki er mannaverk.

At ein danskur prestur kemur til Føroya og setur spurnartekin við, um vit í Føroyum ikki eru slík, sum buka børn okkara, so at tey liggja bløðandi á gólvinum, má sigast at vera langt úti, og ein fær varhuga av, at Møllehave, tá ið hann sipar til søguna í Lukas 10, hevur hug at identifisera føroyingar við ránsmenninar, prestin og levitin heldur enn við hin miskunnsama samverjan.

Um Møllehave ikki veit um allar sólskinssøgurnar, sum føroyingar kunnu siga frá, so átti journalisturin at vitað okkurt. Eg hugsi um, hvussu stórt hjartalag føroyingar upp ígjøgnum tíðirnar og til dagin í dag hava víst teimum, sum vóru illa stødd – t.d. tá ið heilar skipsmanningar ikki bóru boð í bý, og bygdir gjørdust nærum mannleysar, og eftir sótu einkjur og faðirleys, sum komu ígjøgnum við hjálp frá Gudi og góðum fólki.

Tað kundi verið so nógv at nevnt. Eg hugsi um alt tað hjálpararbeiði, sum einstaklingar, kirkjur og samkomur hava gjørt og gera, t.d. tey, sum í áravís hava ferðast til Rumenia og onnur lond við hjálp av bæði einum og øðrum slag. Jú, tað kundu verið mangar sólskinssøgur at sagt frá.

Eg hugsi, tað verður ringt hjá Møllehave at finna eitt land, sum hevur fostrað so nógvar miskunnsamar samariubúgvar sum Føroyar, og man hann vita, at Føroyar eru heimsmeistarar í at senda trúboðarar út í onnur lond. Og visti journalisturin, Anna Ellingsgaard, ikki tað, tá ið hon ger hesa samrøðuna. Hevði tað ikki verið viðkomandi at konfrontera mannin við tað?

Fjølmiðlarnir eru óførir at vera á gosi, tá ið onkur gerst føroyameistari í onkrari ítróttargrein, fyri ikki at tala um, um vit vinna ein landsdyst. Men at vit eru heimsmeistarar á hesum økinum, fer bara aftur við borðinum.

Tað eru ómetaliga nógvir føroyingar, sum millum ár og dag hava verið úti í hjálpararbeiði í styttri og longri tíðarskeið. Og úr Føroyum eru í dag umleið 50 trúboðarapør úti í fulltíðartænastu (umframt fleiri einstaklingar), sum lutfalsliga eftir fólkatalinum er tað mesta í heiminum. Flutt yvir á donsk viðurskifti, skuldi tað givið umleið 5000 trúboðarapør, og vóru lutfalsliga líka nógvir amerikanarar, skuldu teir havt sent 280000 pør út. Tó hevur einki land sent so nógvar trúboðarar út sum USA í tali, og koma teir klárt inn sum nr. 2 eftir fólkatalinum (hetta í dag so hataða Amerika!).

Er tað nakað, vit føroyingar kunnu gleðast um og vera stoltir av, so er tað, at tað úr Føroyum eru farnir so nógvir trúboðarar út í fremmand lond.

Papua Nýguinea, Filipsoyggjarnar, Senegal, Tansania, Nigeria, Venezuela, Russland og Tailand – fyri at nevna nøkur av londunum, har hesir trúboðarar virka – hesir miskunnsomu samverjarnir, sum neyvan hava stundir til at granska Shakespeare og H.C. Andersen, men eru upptikin av at hella olju og vín í sárini hjá teimum, ið treingja, og boða teimum gleðiboðskapin – boðskapin um hitt einasta fundamentið, sum heldur, tá ið ódnirnar koma.

Tey, sum hvíla á tí fundamentinum, eru tey einastu, ið av røttum kunnu kallast fundamentalistar!

At ein danskur prestur er fullur av fordómum um føroyskt kirkju- og samkomulív, kunnu vit kanska bera yvir við. Men at føroysk fjølmiðlafólk eru so lítið objektiv, tá ið tey viðgera slík evni, er ræðandi!

---

**Fuglafjørður 01.12.2004**

## Ein heilsan til Jústinis Leivsson Eidesgaard

*Jústinis heilt óskiljandi, tað kann lata seg gera,*
*at tú, eitt so flott bókaverk, kanst til føroyingar levera,*
*nú kanst tú hvíla, og hyggja frameftir, við góðum treysti,*
*sum rithøvundur, teljist tú millum teir allar bestu.*

*Bókin um Kaj eitur, Kaj ein dokumentarisk ævisøga,*
*tað mangan føroyingin, við takksemi og gleði, man frøða*
*Á Hellunum, hevur tú sitið og kanna og bókina skriva*
*í dagar og nætur, tú varst mangan móður og kanska í iva.*

*Perman, eitt prýði er, har Kaj á verandanum stendur,*
*sær út at leggja skip og manning, í Harrans hendur,*
*eg ivist onga løtu, at tú mangan hetta, eisini gjørdi,*
*áðrenn tú síðsta blaðið, í hesum megnarverki fullførdi.*

*Hevði tú ikki stuðul, frá Poulu, Edvard og Fría fingið,*
*hevði tað ikki, við hesum megnarverkið hjá tær gingið,*
*bókin er sera væl skrivað og myndirnar bókina prýða,*
*sera spent vit eftir næstu bókini hjá Jústinusi bíða.*

**Vit á Kvíggjarvegi 7**

---

# Mótmæli

**Føroya Reiðarafelag**

Føroya Reiðarafelag mótmælir harðliga, at Framtaksgrunnurin hevur lagt Fiskasøluna undir Fiskavirking við tí endamáli at avhøvda ein kappingarneyta til Fiskavirking.

Fiskasølan hevur í ár verið keypari av ráfiski og hevur megnað at skapa eina ávísa kapping um ráfiskin. Fiskasølan hevur í fleiri førum syrgt fyri, at avreiðingarprísirnir eru hækkaðir og at meiri fiskur tí er komin til virkingar í Føroyum.

Fiskasølan hevur gjørt strategiskar íløgur og byrjað framleiðslu bæði í Hvalba og Vági og ítøkiligar ætlanir vóru at fara undir upsaframleiðslu í Fuglafirði.

Leiðslan á Fiskavirking hevur longu steðgað øllum innkeypi av fiski, sum Fiskasølan hevði í Klaksvík frá útróðrarbátunum og til virkini hjá Fiskasøluni í Suðuroy, so nú er stórt sæð eingin kapping um útróðrarfiskin, upsa, kongafisk, svartkalva, toskin av Rygginum v.m.

Nevnd og leiðsla í Framtaksgrunninum eru ikki sína uppgávu vaksin, tá tey ikki taka av einum møguleika at selja Fiskasøluna, sum tey sjálvi onga framtíð síggja í.

Nevnd og leiðsla í Fiskavirking er heldur ikki sína uppgávu vaksin, tá tey avhøvda ein kappingarneyta í staðin fyri at taka kappingina upp við hann.

Reiðarafelagið hevur ferð aftaná ferð víst á, at um kapping er um fiskin í Føroyum, verður hann avreiddur her, men Fiskavirking fer nú at arbeiða fyri at løggivið verður um, at allur fiskur skal landast í Føroyum – til undirprís, tí eingin kapping er um fiskin.

Virkið í Vági er jú prógv um, at Fiskavirking ikki vil hava kapping um fiskin.

Ger politiski myndugleikin onki við núverandi gongd, fer meginparturin av heimaflotanum á heysin. Sannlíkasti keypari tá verður Fiskavirking, sum soleiðis bindur skip og virkir saman aftur og ásetur tá einsamalt prísin fyri ráfiskin.

---

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.